

*Fólk í ísraelska býnum Haifa vórðu ræðsluslígin, tá ávaringarlúðrarnir boðaðu frá, at Hizbollah-rakettir vóru á veg ímóti býnum*

*Mynd: Reuters*

# Vilja ikki hava ST-herlið við markið

**Hvørki Ísrael ella Hizbollah vilja hava altjóða herlið at hava eftirlit við markinum millum Ísrael og Libanon**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, og fleiri evropeiskir leiðarar hava skotið upp, at ST skal senda eitt altjóða trygdarherlið til Miðeysturs at hava eftirlit við markinum millum Ísrael og Libanon. Men tað vilja hvørki Ísrael ella Hizbollah hoyra talan um.

Ísraelski forsætisráðharrin, Ehuf Olmert, segði í gjár, at tað er libanski stjórnarherurin, sum skal hava eftirlit við leiðunum libansku megin markið. Hann tók uppaftur, at Ísrael fer at steðga sínum álopum, so skjótt Hiabollah letur teir báðar burturfluttu hermenninar leysar, og so skjótt Hizbollah gevst við sínum rakettálopum á Ísrael.

Olmert nevndi ikki ætlanina hjá Kofi Annan og teimum evropeisku leiðarunum um eitt altjóða trygdarherlið við einum orði, men týðandi ísraelskir embætismenn søgdu, at forsætisráðharrin er ikki serliga fegin um ta ætlanina.

### ST-herleið

Síðani 1978 hevur ST havt 2.000 hermenn har suðuri í Libanon. Hetta er ein eftirlitsdeild, men hon hevur ongar møguleikar í tí stríðnum, sum nú leikar á.

Í gjár segði bretski forsætisráðharrin, Tony Blair, at altjóða samfelagið eigur at senda eitt størri herlið til markið millum Ísrael og Libanon, og hesum tók Kofi Annan undir við. Tað ljóðar, at fleiri evropeiskir leiðarar taka undir við Blair.

Men ísraelska stjórnin vil ikki vita av fremmandum hermonnum við markið, og tí hevur Ehud Olmert endurtikið, at tað er einans libanski stjórnarherurin, sum skal hava støð hinumegin markið.

Hesum tekur USA undir við – í hvussu er fyribils, og amerikanski ST-sendiharrin, John Bolton, segði í nátt, at ST-trygdarráðið tekur onga støðu til viðurskiftini í Miðeystri, fyrr enn ein sendinevnd hjá felagsskapinum er komin aftur úr Miðeystri seinni í vikuni. Í sendinevndini er millum annað kendi norski Miðeystur-diplomaturin Terje Rød Larsen.

### Villepin og Rice

Franski forsætisráðharrin, Dominique de Villepin, er í Libanon, har hann roynir at fáa partarnar at semjast um vápnahvíld. Á G8-fundinum um vikuskiftið var Frakland tað landið, sum fanst harðast at ísraelsku álopunum á mál í Libanon.

– Ætlan okkara er at fáa partarnar at semjast um eina vápnahvíld við treytum, sum allir partar kunnu góðtaka, segði de Villepin í Beirut í gjár. Hann legði afturat, at eftir tí franska uppskotinum skal libanski stjórnarherurin fáa hjálp frá einum altjóða herliði, sum hann kann fáa eftirlit við markinum til Ísrael.

de Villepin er tann einasti vesturlendski stjórnarpolitikarin, sum er farin til Miðeysturs at royna semju, men amerikanska uttanríkisráðið kunngjørdi í gjárkvøldið, at Condoleezza Rice, uttanríkisráðharri, umhugsar at fara hagar at tosa við partarnar. Talsmaðurin hjá uttanríkisráðnum dugdi tó ikki at siga, nær hon fer avstað.

## 100.000 flýdd úr Libanon

**Tey flýggjandi noyðast ígjøgnum Sýrialand, tí Ísrael hevur bumbað flogvøllin í Beirut og stongt libansku havnirnar**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Teir sýrisku vaktarmenninir á libanska markinum hava úr at gera í hesum døgum.

Síðani Ísrael byrjaði at bumba mál í Suðurlibanon og Beirut fyri fimm døgum síðani, eru meiri enn 100.000 fólk komin um markið, siga sýrisku myndugleikarnir, og aftur í dag komu bilar og bussar við fólki, sum flýggja undan ísraelsku bumbunum og rakettunum.

Sýrisku myndugleikarnir siga, at 24.000 libanar eru komnir um markið síðani hósdagin í síðstu viku. 27.000 arabar, sum yvirhøvur eru úr londunum við Persaflógvan, eru eisini flýddir úr Libanon. Harumframt hava marknaliðini skrásett 19.000 sýriskar ríkisborgarar og 6.500 fólk úr ymsum londum. Hjá teimum seinastu 28.000 er tjóðskapurin ikki skrásettur.

Nógv lond í Vesturheiminum hava skipað fyri flogrutum til Damaskus fyri at fáa sínar borgarar heim. Fleiri túsund norðurlendingar vóru í Libanon, tá ísraelsku álopini byrjaðu. Teir fyrstu donsku ríkisborgararnir komu til Danmarkar fyrradagin, og í gjárkvøldið kom tað fyrsta flogfarið til Oslo við fólki úr Libanon.